**Kári P. Højgaard**
**Jógvan Skorheim**
**vegna Sjálvstýri**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 6/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd** (Ókeypis læknaváttan)

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd**
(Ókeypis læknaváttan)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 178 frá 22. desember 2009 um almenna heilsutrygd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 36 frá 30. apríl 2018, verður gjørd henda broyting:

Aftaná § 9 verður sett:
”*Endurnýggjan av koyrikorti*

**§ 9 a.** Persónar sum skulu endurnýggja koyrikortið vegna aldur, skulu ikki rinda fyri kravda læknaváttan.”

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2019.

**Kapittul 1. Almennar viðmerkingar**
Farna árið gjørdi danska stjórnin greitt, at tey ætlaðu at avtaka aldurskravið til eldri borgarar við endurnýggjan av koyrikorti.

Samtykta lógin, ið varð lýst at galda í Danmark frá 1. juli 2017, hevði sum vanligt er ásetingina: “Henda lóg ikki er galdandi fyri Føroyar og Grønland”.

“Í almennu viðmerkingunum til donsku lógarbroytingina, verður m.a. sagt: “*Efter en samlet afvejning af forskellige modstridende hensyn anbefalede Justitsministeriet, Sundhedsstyrelsen og Rigspolitiet, at der fortsat burde være en fast aldersgrænse.*

*Arbejdsgruppen fandt ikke nærmere lægeligt videnskabeligt belæg for at pege på en bestemt ny aldersgrænse. Beslutningen om fastsættelse af aldersgrænsen måtte således bero på bredere, herunder i høj grad politiske, overvejelser med afsæt i de forskellige modstridende hensyn”.*

Í Svøríki er onki ovara mark fyri ta vanligu gildistíðina, sum er 10 ár, men endurnýggjan av koyrikortinum er treytað av, at fylt verður út ein eginváttan um heilsu.

Í Noregi eru koyrikort til akfør í flokki 1 galdandi í 15 ár, til handhavin hevur fylt 75 ár. Endurnýggjan eftir 75 ár er treytað av nýggjari læknaváttan. Hareftir sum 78 ára gamal og eftir tað 2. hvørt ár.

Í Finnlandi er gildistíðin hjá koyrikortum vanliga 15 ár, tó í mesta lagi til handhavin hevur fylt 70 ár. Endurnýggjan eftir tað er treytað av nýggjari læknaváttan 5. hvørt ár.

Í Bretlandi eru koyrikort til akfør í flokki 1 galdandi í 10 ár til handhavin hevur fylt 70 ár, og eftir hetta er gildistíðin 3 ár. Onki krav um læknakanning, men handhavin skal útfylla eina eginváttan um heilsu.

Lond sum Týskland, Frakland og Eysturríki hava ikki nakað ovara mark fyri vanligu gildistíðina, og sostatt eru ongi serlig krøv til koyrikort hjá eldri."

Frá 1. juli 2014 hevur verið galdandi í Føroyum, at koyrikortið er útgivið við 15 ára gildistíð, tó í mesta lagi til handhavin hevur fylt 70 ár – (seinni broytt til 75 ár).

Samanbera vit okkum við omanfyri nevndu londini, hava Føroyar kravmiklastu ásetingarnar fyri endurnýggjan av koyrikorti hjá eldri bilførarum. Víst verður eisini til tær almennu viðmerkingarnar í lm. nr. 5/2018.

Tá persónar skulu endurnýggja koyrikortið vegna aldur, skulu teir til eina kravda læknakanning. Henda kanning kostar vanliga millum 300 og 400 kr., sum persónurin sjálvur hevur rindað til læknan. Hetta verður broytt við hesum uppskoti, soleiðis at kravda læknakanningin verður ókeypis fyri borgaran.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Tað er torført at meta um tær fíggjarligu avleiðingarnar fyri landið. Tað er eingin fastur takstur, sum læknar taka fyri hesa læknakanning, men gjaldið liggur vanliga millum 300 og 400 kr. Tað verður tó ikki neyðugt at fara so ofta til læknakanning, tí vísandi til lm. nr. 5/2018 verður skipanin broytt soleiðis, at tað frameftir bert verður neyðugt at endurnýggja koyrikortið fimta hvørt ár.

Viðfest er ein útskrift frá Akstovuni, sum vísir talið av endurnýggjaðum koyrikortum seinasta árið, frá 1. juli 2017 til 30. juni 2018 fyri persónar, sum eru 75 ár og eldri. Talan er um 915 persónar. Verður uppskotið samtykt, soleiðis at læknaváttan bert skal gerast fimta hvørt ár, verður hetta talið lægri frameftir.

Um vit siga, at 700 borgarar endurnýggja koyrikortið, so liggur kostnaðurin fyri landið á umleið 245.000 kr. (700 x 350).

**Serligar viðmerkingar**
**Til § 1**
Frameftir skulu persónar, sum skulu endurnýggja koyrikortið vegna aldur, ikki rinda fyri kravda læknaváttan ella læknakanning.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

**Á Løgtingi, 21. august 2018**

Kári P. Højgaard Jógvan Skorheim

**Fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Yvirlit frá Akstovuni yvir endurnýggjað koyrikort.